# Netfrøðingur

Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum sóknast eftir samskiftisfólki við tekniskum innliti í heimasíðuskipanir.

Starvið fevnir um samskipan og menning av nýggju heimasíðu stovnsins og gerð av kunningartilfari í hesum sambandi. Harafturat fer samskiparin at arbeiða við vanligum kunningar- og fyrisitingarmálum.

Um tú verður okkara samskiftisfólk, fert tú at samskipa øll kunningartiltøk hjá Fróðskaparsetri Føroya, og tín ávirkan á uppgávur og arbeiðsumhvørvið er proportional við tína fakligu barlast og pondus.

Vit ímynda okkum, at tú fakliga hevur eina bakgrund í marknaðarføring og/ella samskifti. Royndir og førleiki við Typo3 ella øðrum líknandi skipanum er ein stórur fyrimunur. Men hinvegin, klárar tú at sannføra okkum um, at tú ert tann rætti persónurin til stóru uppgávuna, eru vit sinnað at lata teg royna.

Talan er um fulltíðarstarv frá 1. desember ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir eru sambært avtalu við Lønardeildina og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðsplássið frá Anniku Sølvará á tel. 352504 ella á ***annikas@setur.fo***

Umsókn, við viðkomandi skjølum, ið skulu verða okkum í hendi innan 12. oktober, skulu sendast til

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
Att.: Annika Sølvará
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn

***ella til annikas@setur.fo***

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

TEAM85



# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN

## AutoCad grundskeið

Hevur tú ætlanir um, at førleikamenna teg innan faktekning á teldu, hevur tú møguleika til at luttaka á hesum skeiðnum.

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað øllum áhugaðum við telduførleika á vanligum brúkara støði.

**Endamál**
Endamálið er at geva luttakarunum førleika til at tilrættaleggja og tekna 2D tekningar við forritinum AutoCad.

**Innihald**

- **Byrjan** - Lært verður um funkurnar á 2D støði
- **Fyrireiking** - Tilrættalegging av tekniuppgávum
- **Tekning** - Uppgávur og kjak
- **Eftirmeting** - Skeiðið endar við eftirmeting av arbeiðinum og undirvísingini.
- Luttakarin fær skeiðsváttan eftir lokið skeið.

**Tíðarskeið:** 22; 23; 25; 26. okt. 2007, kl. 09.00-16.00
**Skeiðshaldari:** Marita Hentze
**Kostnaður:** Kr. 6.900,00
**Tilmeldingarfreist:** 11. oktober ella so leingi pláss er eftir

TEAM85

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur ella heilsurøktari til Dagtilhaldið við Hoydalsvegin

Søkt verður eftir pedagogi ella heilsurøktara at arbeiða 22 tímar um vikuna.

Endamálið við Dagtilhaldinum er at skapa eitt umhvørvi, har brúkarin fær kensluna av at gera mun í gernadisdegnum hjá sær sjálvum og øðrum.

Dagtilhaldið er opið gerandisdagar frá kl. 11 til 15.

**Vit vænta, at tú:**
- tekur lut í avbjóðingini at skipa gerandisdagin í Dagtilhaldinum
- sjálvstøðugt kann seta í gongd og skipa fyri virksemi
- sær týdningin av góðum samstarvi

**Setunarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag ella Almanna- og Heilsurøktarafelagið

Nærri fæst at vita um starvið frá Jonnu Petersen, leiðara á tlf: 289100.

Umsókn við hjáløgdum próvskjølum, lívsgongdarlýsing og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Dagtilhaldið við Hoydalsvegin
Stílað: Jonna Petersen, leiðari
Hoydalsvegur 4
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist 15. oktober 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Starv í nýggjum ráðgevingarvirki

Treingir tú til luftskifti? Leingist tær eftir at fløva onnur við tínum førleikum og royndum? Og hevur tú hug at oysa av tínum ágrýtni í einum nýggjum toymi innan føroyska byggivinnu? So ert tú vælkomin inn í hitan hjá okkum.

PB Consult sóknast eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella líknandi til projekterings- og eftirlitsarbeiði innan fyri:

- HVS-skipanir
- Kloakkskipanir
- Vatnveiting
- Fjarhitaskipanir
- Sprinklaraskipanir

Í okkara nýggja verkfrøðingavirki fært tú møguleika at arbeiða sera sjálvstøðugt, at taka avgerðir og í stóran mun sjálv/ur at leggja tær arbeiðsdagin til rættis.

Vit vænta, at tú hevur førleika í forritum sum AutoCad, Word og Excel.

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu millum teg og okkum.

Vit eru í holt við fleiri spennandi verkætlanir, og tí er best, um tú kanst byrja skjótast gjørligt. Men vit bíða fegin eftir tí rætta persóninum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pætur Húsgarð, tlf 23 82 00 ella teldupost ph@pbc.fo

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 5. oktober 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

pb CONSULT
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR

Heykavegi 6B • Postsmoga 1395 • FO-110 Tórshavn
Telefon: 30 82 00 • Faks: 30 82 01 • www.pbc.fo

*PB Consult er ráðgevandi verkfrøðisvirki, sum bleiv sett á stovn í mars í ár. Felagið veitir ráðgeving innan HVS-skipanir, vatnveitingar og vatnreinsiverk, kloakkleiðingar og kloakkreinsiverk, fjarhitaskipanir, sprinklaraskipanir, køvigasskipanir, projekteringsleiðslu og byggileiðslu. Pætur Húsgarð og Bjarni Jakobsen, sum hava útvið 18-ára royndir innan ráðgevandi verkfrøði, eiga PB Consult. Felagið er limur í Foreningen af Rådgivende Ingeniører (F.R.I.) og er vælútgjørt við nýggjasta útbúnaðinum, sum hoyrir til á einari nýmótans teknistovu.*